DAGSINS MEINING

Børn og ferðsla

Um nakrar dagar byrja slúlamir aftur. Fleiri hundrað børn og ung fara út aftur í ferðsluna. Nøtur av hesum fara í slúla fyri fyrstu ferð. Sum øllum lunnugt er ferðslan í Føroyum stór og sera nógvir bilar eru á vegunum. Við slúlaársbyrjan velsur ferðslan upp aftur meira. Hartil kemur, at nógvir slúlar standa við vegir, har nógv ferðsla er.

Tann stóra ferðslan og staðsetingin av slúlum við vegir við nógvari og harðari ferðslu merkja, at børn og ung á veg í slúla og staðougt eru í vanda í tí nógvu ferðsluni. Tað liggur ein sera stór ábyrgd á øllum partum í sambandi við ferðslutrygdina hjá børnum og ungum. Slúli og heim eiga at samstarva um at læra børnini at vera ansin í ferðsluni, at nýta súlutujálm o.m.a. Bilførarar eiga at vísa fyrilit og at ansa eftir ferðini, serstaldiga har nógv slúlaferðsla er.

Ein spurningur er, hvat almennir myndugleikar loundu gjørt meira til tess at bøta um ferðslutrygdina. Ráðið fyri ferðslutrygd ger eitt stórt og gott arbeiði fyri ferðslutrygdina hjá oldrum øllum og serstaldiga hjá børnum, og í slúlunum læra børn um ferðslutrygd. Men so eru tað aðrir myndugleikar. Sum lunnugt standa nógvir slúlar við kommunalar vegir og við landsvegir. Avvarandi kommunal- og landsmyndugleikar eiga at kanna eftir, um ildi ítøkilig tiltøk av ymsum slagum loundu verða framd við slúlamar og á teimum vegum, har serstaldiga nógv slúlaferðsla er.

Tað, sum hugsað verður um í hesum sambandi, er eitt nú, at ferðin verður minkað við, at skeltu verða sett upp, og at ymsar forðingar verða lagdar á sjálva vegbreytina við tí fyri eyga at minka um ferðina. Eisini ber til at skúlja tey gangandi frá bilferðslu við eitt nú tunnlum undir vegum við slúlar, eins og fleiri ferðstujlós eiga at verða umhugsað. Slúlamir eiga sjálvir at umhugsa, hvat ið ítøkiliga kann verða gjørt fyri at bøta um trygdina uttan fyri slúlarnar, eitt nú við at havi fólk at ansa eftir við teir mest vandafult staðsettu slúlamar ávísar tíðir á degnum. Ein serstalur vandabólkur eru tey sum nýta súlutu. Bert fáar súlutubreytir eru í landinum, og hetta er stórt spell. Hetta kann bøtast um, um viljin er til tað hjá avvarandi myndugleikum. Hetta merkir, at kommunur og landsverkfrøðingur eiga at umhugsa hendan spurning og at gera naktað munagott við hann. Samanumtiltíð hava vit øll – foreldur, bílførarar, slúli og avvarandi myndugleikar eina stóra ábyrgd fyri ferðslutrygdini, eina ábyrgd sum vit øll vónandi megna at líva upp til.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Færri fiskidagar uttan prógvgrundir

Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður

Eingi haldgóð prógv fyri at lækka fiskidagatalið. Prógvgrundimar hjá Jóni Kjartansson og Fiskimannafelagnum viga tungt, men ikki í Løgtinginum og hjá fiskifrøðingunum.

At skerja fiskidagamar við tí grundgeving, at flotin er vorðin effektivari, er sera ivasamt og kemur at raka ymisku veiðubólkamar ymiskt og órettvístt.

At skerja fiskidagtalið yvir ein kamb, rakar línuskipini og eitt nú útróðrarflotan, meðan meir enn aðrar partar av flotanum, tí línuskipini og vanligir útróðrarbátar sum nógva út frá landi eru ikki vorðnir effektivari. Tað gongur yvir mátt vit og er sera hugstoytt at siggja, at allir uttan Róni Hentze í Tjóðveldisflokkinum atkvøddu fyri at lækka fiskidagatalið. At útróðramenn og línumenn kenna seg svikna skilji eg vel.

Fiskifrøðingar fara skeivir

Fiskifrøðingamir eru farnir skeivir fero eftir fero, ár um ár um ár... - Hvørdu vit einvíst havt fylgt teina tilráðingum undanfarin ár, hevði fróðreyska samfelagið mist veiðiinntøkur fyri hundratalsmilliónir og vinnulivið og alt samfelagið komið út í ófeld.

Vit hava fiskað munandi meiri enn fiskifrøðingamir hava rátt okkum til, men fiskistovnamir eru framvegis vel fyri. Eg ivist ikki í, at tað er neyðugt at fiska nógv, tá fróðin í havinum ikki skerst til og ov lítið er til allan fiskin. Gera vit ikki tað, verður allur fiskurin rak og tað bara doyr burturav. Hinvegin við at taka burturúr gevur tú meiri rúm fyri tí eftirlivandi fiskinum at veksa.

Lætið okkum standa saman um at verja fiskidagaskipanina og ikki sum nú lækka fiskidagatalið meiri enn effektivitetsvinn ger.

Fólkaflokkurin vil skapa tryggar kamar undir útróðrarflotanum og fiskivinnumi og fiskil ikki lækka fiskidagatalið.

Heimsins 100% trygga flogfar á samanstoytskós

John S. Myllhamar

So hendi tað, ið sambært talsmanninum hjá Atlantsflog, Jørmund Vágadal, ikki kundi koma fyri, at flogfarið hjá Atlantic Airways fór av kós, fór tósund metrar hægri upp enn tað hevði fingið boð um, við stevni móti Gorum flogfarið.

– Fantastiskt - ótrúligt - gátuført. Vágadal, sum her í blaðnum valdagin í fjór, gjørdi øll ommur flogfør og flogfelg, ið hava flogið og, sum flúgva uppá Føroyar, vandafull og ótrygg at flúgva við, gjørdi bæði íslendskar og danskar flogskipanar kriminellar og, sum kravdi ein danskan flogskipara frá, tí hesin hevði lent í ov ringum likindum inn yvir Sørvágsfjørð, slikt, ið sambært Vágadal aldri er, ella fer at koma fyri við Atlantsflog, skyldar teimum fernandi eina meiri frágreiðing hvat í veðrini er hent í loftrúmínum vestanfyri Ísland hin 1. august í ár.

Sosialurin

Lesið Sosialin -tað loysir seg!

W W W . S O S I A L U R I N . F O

Sosialurin

Sosialurin
Stofnaður: 1927
Ábyrgðarblaðstjóri: Jan Miller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Einkur Lindenskov
einkur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mark
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðið:
Iki Bertholdsen iki@sosialurin.fo
Eydun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Bøgvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson magnus@sosialurin.fo

Prøttur:
Jákup Mark jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Ólvur Haraldsen olvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jens@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 291
Norðoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 456886 fax 456887
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375864 fax 375464
tel. 220727
e-post: vestur@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 149, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppsetingarpartur:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Spf Sosialurin
Afgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Jrgjavegur 26,
Tel. 341800, Fax: 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Stórri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Tysdagsblaðið	Mán. kl. 10	Fri. kl. 15	Fri. kl. 12	Fri. kl. 12
Miðudagsblaðið	Tys. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Tys. kl. 15	Tys. kl. 12	Tys. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Fri. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Stórri lýsingar, sum nógv arbeið stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framhjálæs má umbiðjast í góðari tíð

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigamar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult nevn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið

Ovastevnan gav 307.000 krónur brutto

– Næsta stigið verður at gera stoypiarbeiði til svimjihøllina liðugt, sigur Leo Poulsen

OVASTEVNA
Vilmund Jacobsen

Hósast ovastevnan, sum nú hevur 10 ár á baki, í fleini ár hevur verið ein rættiliga vel vitjað stevna, er likt til, at fleini og fleiri fólk leita sær út til Nólsoyar á hvørjum ári.

Flutningstólini hjá Rytuni siga eitt sindur um, hvussu vel stevnan í veruleikanum verður vitjað.

Síðsta frúggjadag flutti strandferðskipið 400 fólk um fjørðin, 2100 vóru við leygardagin og 543 sunnudagin.

Hetta eru stór tøl, tá ið havt verður í huga, at bert sløk 280 fólk búgva í Nólsoy!

Í øllum førunum er greitt, at talið av fólki í bygdini stevnudagamar er rættiliga stórt í mun til íbúgvarantalið annars.

Vit tora at siga, at eftir fólkatalinum í Nólsoy setir ovastevnan øll met. Sjálvt ikki ólavsøkan er – prosentvís – eins vel vitjað og ovastevnan!

307.000 krónur

Tyskvøldið hevði stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy fund, har talt varð upp, hvussu nógv stevnan hevur givið.

– Vit hildu, at stevnan gav ógvuliga nógv seinasta ár, tá var bruttotalið 280.000 krónur. Nú talt er upp í ár er bruttotalið 307.000 krónur. Hetta eru vit serstakliga vel nøgd við, sigur Leo Poulsen.

Spurður, hvussu stórt nettotalið kann væntast at verða, tá ið avtomar, sigur hann, at tað dugir hann ikki at meta um beint nú.

– Men hetta verður í hvussu er eitt gott ískast til svimjihylin, leggur hann aftast.

Dansurin gav mest

Tiltakið, sum gav mest á ovastevnu, var dansurin í tjaldinum leygarkvøldið, tá ið bólkurin, Showmen, speldu. Hetta kvøldið vóru ikki fleiri enn 820 atgongumerki seld og saman við sølumi í pylsuvognum, sum bæði frúggjakvøldið og leygarkvøldið stóð í skúlagarðinum, gav dansurin leygarkvøldið slakar 85.000 krónur.

Frúggjakvøldið vóru 130 atgongumerki seld til dansin.

Samanlagt vóru 950 fólki í dansi á ovastevnu, og tað man vera óhoyrt í eini so lítlan bygd sum Nólsoy.

Leo sigur, at tiltakið, ið gav næst mest, var tombola, sum gav góðar 50.000 krónur brutto. Samlaða sølan í pylsuvognunum, sum skifti millum Nyggjaveg og skúlagarðin, var góðar 40.000 krónur brutto.

Tó skilst, at allir bátamir endaðu ikki í Nólsoy. Men aðrir bátar enn teir, sum vóru við í regattasiglingini, komu eisini út til Nólsoyar, bæði úr Havn og av Skálafjørðinum.

So, bátatalið á Nólsoyarvik leygarkvøldið var rættiliga stórt.

Svimjihylurin

Leo Poulsen sigur, at næsta stigið verður at gera stoypiarbeiði til svimjihøllina liðugt, men hetta verður neyvan í ár.

Spurður, hvussu langt stoypiarbeiði er komið, og nær væntast kann, at høllin stendur inni lokað, sigur hann, at stívliga helmingur er stoyptur.

– Nær høllin stendur inni lokað, er ógjørligt at siga nakað um í ljósi.

Leo vísir á, at stuðulsnevndin hevur sólt yrniskar danskar grunnar um stuðul, men hingartil hevur ikki eydnast at fáa nakað haðani.

– Vit hava tí bert tann peningin at arbeiða við, sum tey tiltøk geva, ið vit skipa fyri, sigur Leo Poulsen.

Vir 3000 fólkvórðu iti í Nólsoy á ovastevnu

Sam mynd

Eingin tunfiskaveiða í føroyskum sjógvi í ár

– Japanesarar hava ikki vístføroyskum sjógvi nakran serligan áhuga í ár, sigur Hjalti í Jákupsstovu á Fiskirannsóknarstovuni

FISKI VINNA
Vilmund Jacobsen

Seinastu árini eru 2-3 japansk tunfiskaskip sloppin at fiska tunfisk í føroyskum sjógvi, men í ár hevur eingin veiða verið.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at japanesarar lítlan og ongan áhuga hava vístfør oyskum sjógvi í ár.

Hann vísir á, at fiskiskapurin hevur verið minkandi seinnu árini, og harafturat kemur, at prísurin á tunfiski á japanska heimarknaðinum er fallin.

– Japanesarar hava goldið nakað fyri at fiska tunfisk her hjá okkum, men í ár hevur eingin áhugi verið. Onkur hevur tó spurt, um teir kunnu sleppa at fiska ókeypis, men tað hava vit ikki hildið verið rætt, sigur hann.

Okkurt ár fingu skipini fitt av tunfiski, men fiskiskapurin er minkaður, og seinasta ár varðnadist einki serligt.

Skipini plagdu at fiska í føroyskum sjógvi til nakað út á heystið.

Eygleiðarar

Japansku skipini, sum hava verið undir Føroyum, hava altíð havt føroyskar eygleiðarar umborð.

Guttormur Djurhuus hevur verið við øll árini og aðrir, sum eisini hava sólt hesa uppgávu, eru eitt nú Robert Poulsen og Kenneth Justesen.

Skipini, sum hava verið í føroyskum sjógvi, hava eisini kunnað verið í altjóða sjógvi, men tá hava japanesarar goldið fyri at havt føroyskt eygleiðaraman umborð.

Okkurt føroyskt tunfiskaloyvi er givið, og onkur verð hevur verið gjørd, men enn er tunfiskiskapur ikki vorðin vinnulig veiða í Føroyum.

Japanesarar hava ikki vístføroyskum sjógvi nakran serligan áhuga í ár.
– Orsøkin er minkandi fiskiskapur og lækkandi prísir á japanska heimarknaðinum, sigur Hjalti í Jákupsstovu